## Sonur Sheringham venur hjá Toda

19 ára gamli sonurin hjá ensku fótbóltslegenduni Teddy Sheringham skal hesa vikuna royndarvenja í FC Amager, har fleiri føroyskir spælarar eisini eru sáttmálabundnir. Charlie Sheringham hevur seinast spælt fyri Crystal Palace, men nú hevur hann hug at royna eydnuna í Danmark. Hann skal vandi á Amager fyrstu ferð leygardagin, í gjár spældi hann við í venjingardysti, og hann verður á Amager til komandi vikuskifti.



## Tey kallaðu okkum FC Tórshavn

- Í byrjanini vóru tað fleiri, sum kallaðu okkum FC Tórhsavn, men vit hava ongar føroyingar á liðnum, sigur Todi Jónsson, nevndarformaður í FC Amager, í stórari samrøðu við danska Tipsblaðið fríggjadagin. Todi Jónsson greiðir í blaðnum frá nýggja felagnum á Amager, og hvør ætlanin er við felagnum. Todi leggur dent á, at FC Amager skal ikki verða nakað føroyskt felag burtur av, men at ungir føroyskir fótbóltsspælarar fara at fáa møguleika at menna seg í felagnum.

# Úrslitini fara at betrast

**Fríggjadagin varð Jens Martin settur í starv sum hjálparvenjari hjá A-landsliðnum. Og sjálvur ivast hann ikki í, at úrslitini hjá liðnum fara at betrast, nú ein fastur bulur hevur tikið skap**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

A-landsliðið hevur fingið nýggjan hjálparvenjara. Tað er gamli landsliðsmálmaðurin, Jens Martin Knudsen, ið hevur verið málmansvenjari, sum nú verður bæði málmans- og hjálparvenjari.

Avtalan varð undirskrivað fríggjadaginog er galdandi fyri HM-undankappingina, ið verður spæld í 2008 og 2009, sigur FSF í tíðindaskrivi.

Jens Martin avloysir John Petersen. Tað bar ikki til hjá John at halda fram sum hjálparvenjari, deils tí hann er upptikin av at venja Formulaliðið hjá Skála, men eisini tí, at hann er í holt við at taka A-venjaraútbúgvingina, og at fleiri av samlingunum í sambandi við hesa útbúgvingina eru samstundis sum landsliðið spælir.

### Úrslitini koma

Nýggi hjálparvenjarin hjá landsliðnum er ikki í iva um, at føroyska landsliðið fer at fáa betri úrslit í komandi HM-undankapping.

- Vit hava brúkt seinastu árini at finna ein nýggjan bul, og eg eri sannførdur um, at vit nú eru við at hava funnið liðið, ið fer at klára seg betur. Vit mugu ásanna, at vit ikki hava somu talent at arbeiða við, sum tey stóru londini hava. Hjá okkum ræður um at finna stríðsandan fram, og brúka hann.

Jens Martin Knudsen dylur ikki fyri, at tað verður eitt upplivilsi at vera við á síðulinjuni, tá Føroyar aftur skulu spæla móti Eysturríki.

- Ja, men fyri meg persónliga er tað meira týdningarmikið at fáa høvi til at geva burturav aftur av teimum royndum, sum eg havi fingið sum spælari, frá tí at føroyska kósin í altjóða fótbólti varð sett út í kortið fyrst í nítiárunum, og vit millum annað vunnu móti Eysturríki, sigur Jens Martin Knudsen.

Hann sær fram móti at arbeiða tættari saman við Jógvan Martin Olsen.

- Vit kennast. Eg var hjálparvenjari, tá Jógvan Martin vandi NSÍ, og eg havi stóra virðing fyri venjaranum og royndunum og vitanini hann hevur.

Hvussu leiklutirnir verða býttir, hava vit ikki tosað um, men eg veit, at Jógvan Martin er opin fyri nýhugsanum, og eg havi ætlanir um at seta mítt fingramerki á landsliðið.

- Tilfarið er til staðar til góð úrslit. Um eg ikki trúði upp á at landsliðið kann klára seg betur, enn vit hava gjørt í seinastu undankapping, hevði eg ikki skrivað undir avtaluna. Eg verði stórliga bilsin, um vit ikki um tvey ár kunnu vera munandi meira nøgd við úrslitið, enn vit vóru, tá seinasta kapping var av, sigur Jens Martin Knudsen við football.fo.

VÍF-StÍF 23-29 (11-14):

# VÍF helt ikki botninum

**VÍF stendur nú av álvara við rygginum móti múrinum. Verjuparturin varð gloymdur móti StÍF, sum nú er fýra stig leyst av botninum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Viljin hjá StÍF at vinna var størri enn hjá VÍF. Og tað var fyrst og fremst hesin, sum var avgerandi í botnuppgerðini í Vestmanna sunnudagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Treytirnar hjá VÍF vóru greiðar undan dystinum móti StIF sunnudagin. Bert ein sigur taldi nóg mikið, og fyrstu løtuna av dystinum tóktist eisini, sum tók VÍF blunkandi ávaringarlampurnar til eftirtektar.

Væl tendraða heimaliðið legði nevnliga bragdliga fyri, og eftir fyrstu 10 minuttirnar tóktust tær vera á sigurskós.

### Knekkaðar

Men sálarliga tóktist liðið tó ikki vera til reiðar eftir mongu tapini á rað, sum tær hava verið fyri. Trúgvin upp á sigurin var í øllum førum sera trupul at fáa eyga á næstu longu løtuna, tá StÍF vendi gongdini frá hóttandi tapi til alt meira sannførandi sigur.

Serliga var tað í verjupartinum, at tað haltaði hjá VÍF. Fleiri ferðir rópti Daniel Rapa til genturnar hjá sær, at tær vóru ov fittar í verjuni.

Og fittar vóru tær. StÍF fekk í nógvum løtum gott pláss at spæla á, og tí kundu serstakliga Rebekka Justinussen, Johanna í Króki og Ninna K. Johansen gera sær dælt av. Ikki minst var tað hugkvekjandi at síggja sjálvsálitið, sum Ninna fylti í bæði seg sjálva og viðspælararnar, sum hon støðugt lyfti upp við góðum spæli, flottum skotum og einum framúr stríðsvilja, sum væl og virðiliga var meira enn tað, sum VÍF megnaði at taka. Og so munaði tað lítið, at VÍF í málinum hevur ein málverja, sum verður roknað millum tær bestu í landinum.

Ikki fyrr enn seinastu løtuna av dystinum tóktust tær á heimaliðnum aftur tora at spæla. Tá var dysturin tó kortini taptur, og spenning megnaðu tær als ikki at skapa aftur.

### Ikki avgjørt enn

Heilt niðri er VÍF tó ikki enn. Men við fýra stigum upp til StÍF og Kyndil skal tað nú vilja serstakliga væl til hjá teimum gulu, um tær ikki aftur noyðast eina deild niður komandi kappingarár. Gaman í hava tær enn dystir til góðar móti bæði StÍF og Kyndli, men málmunurin er hjá liðnum er lítið at reypa av, og tí er helst neyðugt at fáa okkurt stigið afturat teimum fýra, sum kunnu vinnast móti nummar fimm og seks.

Og so er heldur ikki víst, at tað er nóg mikið, tí bæði StÍF og Kyndil hava áður tikið stig frá Neistanum og VB, og tað er jú eingin, sum sigur, at tað ikki kann henda eina ferð afturat.

## FAKTA

**VÍF-StÍF 23-29 (11-14)**
10 min: 6-3
20 min: 7-10
40 min: 15-20
50 min: 18-26
**Málskjúttar**
**VÍF:** Liljan Durhuus 7(2), Ioana Rapa 6, Rannvá á Rógvu 4, Fríða Marjunardóttir 2, Tomma Petersen 1, Katrin Christophersen 1, Heidi Joensen 1, Torgunn Johannesen 1
**StÍF:** Ninna K. Johansen 7, Jóhanna í Króki 6, Rebekka Justinussen 6(2), Signhild Petersen 4, Rósa Johansen 2, Ata Gregersen 1, Sólfríð Christiansen 1, Bára B. Danielsen 1, Oddrún Danielsen 1
**Brotskøst:** VÍF 2, StÍF 2
**Útvísingar:** VÍF 3, StÍF 2
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

# Mugu halda avtalurnar

Tað var ein vónbrotin Daniel Rapa, sum eftir dystin hjá VÍF mátti ásanna, at lið hansara nú er heilt nær niðurflyting.

Ein av frágreiðingunum er helst vantandi royndirnar hjá liðnum, sum fyri tað nógva er í eini endurbyggingarstøðu. Men hetta einsamalt er ikki allur sannleikin, heldur Daniel.

- Tað er rætt, at okkara ikki hava so nógvar royndir. Men tú kanst ikki alla tíðina umbera við, at spælararnir eru somikið ungar. Í dag halda vit ikki avtalurnar í álopinum, og vit halda ikki avtalurnar í verjuni. Og so er tað serstakliga trupult at vinna ein hondbóltsdyst, heldur Daniel.

Enn vil hann tó ikki geva skarvin yvir.

- Tað verður trupult – eingin ivi um tað. Tað er kanska ikki eingongd nóg mikið, um vit vinna seinastu dystirnar móti StÍF og Kyndli, tí helst skulu vit hava okkurt stigið afturat. Men so leingi, sum møguleikin er til staðar, fara vit sjálvandi at stríðast fyri hesum, sigur Daniel.

**-mørk**